VIÐMERKINGAR

# Endurnýggjan innanfyri heimastýrislógina



VAL05

**Andrias Petersen, løgtingsmaður**
*Valevni til fólkatingið*

Breiða ABC-samgongan er samd um at endurnýggja støðu Føroya í ríkisfelagsskapinum við at fáa samtykt eina yvirtøkulóg, sum heimilar Føroya Løgtingi at yvirtaka øll mál uttan tey, sum viðvíkjað sjálvari ríkiseindini, um Føroya Løgting tekur undir við hesum.

Hervið nýtíðmansgera vit heimastýrislógina, sum tosa hevur verið um líka síðan 1988, tá javnaðarflokkurin kom fram við hugskotinum um eina endurnýggjan av heimstýrislógini, tað sokallaðu sjálvstýrislógina.

Eydnast hetta okkum, hava vit loyst tann største knútin í sambandinum millum Føroyar og Danmark og kunnu framhaldandi verða í ríkisfelagsskapinum, har ríkiseindirnar verða meira líka, samstundis átti tann óvirðiligið konfrontatiónspolitikkurin at hildi uppat.

Høvuðsmálið í politikkinum hjá javnaðarflokkinum er, at vit skulu menna okkum sum samfelag og skipað so fyri, at livikorini í Føroyum eru á hædd við londini rundan um okkum, so at vit ikki verða afturútsiglt í kappingini.

Við einum endurnýggjaðum ríkisfelagsskapi hava vit allar møguleikar fyri at skapa eitt gott samfelag, har fólkið vil støðast og mennast, soleiðis at tað eisini verður gott at vera føroyingur í framtíðini.

Eitt javnaðarumboð á fólkatingi vil áhaldandi arbeiða fyri hesum málið.

Vel tí javnaðarflokkin!

## Samstarv er vegurin fram



VAL05

**Helgi Abrahamsen**
*valevni Sambandsfloksins*

Eingin ivi kann vera um, at skal føroyska tjóðin vinna fram, er neyðugt við samstarvi. Vit mugu samstarva innanhýsis og eins og við onnur.

Nú fólkatingsval er útskrivað, bjóðar Sambandsflokkurin seg fram til at røkja samstarvið á Fólkatingi vegna føroyingar. Vit vilja ikki brúka fólkatingssessirnar til at keglast við tey, sum vit av røttum eiga at arbeiða saman við, men vit vilja troyta teir møguleikar, sum liggja í samstarvinum í ríkisfelagsskapinum.

Tekur tú undir við samstarvi heldur enn kegli, so er Sambandsflokkurin títt val tann 8. februar.

Valið er einfalt!

# Fólkaskikk á fólkating



VAL05

**Hans Arne Bertholdsen**
*Sambandsflokkurin*

Nú val er fyri framman verður dúliga skrivað um mangt og hvat. Fekk ein lítlan bókling í postkassan sum var skrivaður av Sjúrða Skaale.

"Tað er býtt at velja fólk sum einki gera til nyttu". "Næstan øll tey sum stilla upp til valið hava annað fulltíðarstarv. Tey fara ikki at røkja fólkatingssessin til lítar" Hetta vóru nakrar av yvirskriftunum sum vórðu brúktar í bóklinginum.

Velja føroyingar fólk, sum skriva slíkt møsn? Hvat er tað sum telur um ein skal fáa atkvøðuna?

Hvussu Sjúrður Skaale kann standa fram og siga, at tey sum stilla upp, ikki fara at røkja sessin til lítar, um tey verða vald, er ilt at skilja. Tí sjálvandi velja fólk valevni, sum tey meina kunnu gera ein mun til tað betra.

**Hvussu hava vit tað**

Hvat hevur Tjóðveldisflokkurin gjørt til nyttu? Teir hava borið fram 66 mál, siga tjóðveldismenn sjálvir. Men hvat eru hetta fyri mál? Svarið er: fyrispurningar oman á fyrispurningar og endurtøkur av somu fyrispurningum, sum fyri ein stóran part ikki hoyrdu heima á fólkatingi. Tað er vorðið sum avrik.

Eg fari ikki at brúka mína tíð uppá at niðurgera aðrar flokkar, men fari heldur at royna at lýsa, hvussu gott vit í veruleikanum hava tað í Føroyum.

Eg havi í mínum starvi arbeitt í mongum londum, og enn havi eg ikki verið í einum landi, har fólk hava tað so gott sum í Føroyum. Hví so brúka alla okkara tíð uppá kegl og grenj?

Heldur skulu vit læra okkum at virðismeta tað, sum vit hava, og umganga tað við skili. Mín meining er, at vit taka alt ov nógv sum eina sjálvfylgju. Vit gremja okkum um smámál.

Tað, sum okkum veruliga tørvar á fólkatingi, eru fólk sum kunnu vísa eitt gott andlit úteftir, fólk sum duga fólkaskikk. At tey eisini fara at arbeiða, má metast sum ein sjálvfylgja.

## Sólstaðarkvæðið
*Fyrsti táttur*

1
Gevið ljóð og lýð á Sólstaðarkvæðið
Sláið ring og stýgum fast á fjaladygd
Sum boðabrot og brimdun ljómandi av megi
Gella rím um Beinisvørð og Sunnbiarbygd
2
Gyltur tráður spunnin er úr kærleikslagdi
Tá ið børn sæl stíga inn á lívsins gátt
Álvar dansa enn sum fyrr í fyrndarfragdi
Heiðra Sunnbiarbørn fyrsta andadrátt
3
Eins og áartutlið fríða, fróur leikti
Óvitin nam kunnleika, í mentan ól
Sagdar sagnir bragdarhugan honum kveiktu
Sunnbiarlyndið signað er av sunnansól
4
Veingjabreiðið floygdir fuglar royna flúgva
Móti hæddum stevna flog á evsta tind
Mjúka móður - reiður fjálgast í at búgva
Úr dvaladúni dagar fuglur frælsis vind
5
Blíður byrur beyðst lotið lá av landi
Bygdarbarn sum floygdur fuglur fleyg avstað
Dygdarførning heiman frá fekk móti grandi
Æra fedrar fosturland og føðistað
6
Rúnarrist er føroyingum í hjartarøtur
Lít á Halgan Drott sum verndar styrkismátt
Treystur gakk tú fram fremmandar gøtur
Tó gloym ei, hvar tú drógt tín fyrsta andadrátt
7
Fjakkandi á fjarleið, hugur heima leikti
Kendist fótafet sum innan eingjargarð
Langtan svár sum elddópur íð heimin kveikti
Brennandi í hjarta heimlandstráin skær
8
Runnin eru ár í útlegd kenst á seggi
Sál tó stinn og sinnið stint sum Beinisvørð
Sett er kós á Røstina vil seggur leggja
Síðsta tein av langferð bygdarsonur rør
9
Eg vil rógva far mítt trygt um Sunnbiarenda
Gjøgnum brotaføll gylt hómast heim í nánd
Í lívd á Sunnbiarmøl vil fjøl mín lenda
Lívsins ódn brátt deyðalogn - svá togna bond
10
Nú er kvirt á garði tøgn í stovu inni
Tynnist skari, frægir fækka her á fold
Reistur varði goymir dýrabæru minni
Um bygdarbarn í vígdu Sólstaðarmold

*G ey*

# Bert hin Eini



VAL05

**Lisbeth L. Petersen**
*Fólkatingslimur Sambandsflokkurin*

Eingin eigur at ivast týsdagin.

Bert hin eini politiski flokkurin hevur eina heilt greiða støðu og boð uppá eina trygga framtíð saman við Danmark og Grønlandi í einum felagsskapi, ið hevur lagt lunnar undir vælferðina í Føroyum.

Hjá einum øðrum flokki eru boðini: føroyskt fullveldi, hvør prísurin enn verður.

Allir hinir flokkarnir vingla og ganga í bólkum, og tí kanst tú ikki kenna teg tryggan, tá talan er um framtíðina hjá Føroyum og føroyingum.

Og so er tað skemtiligi boðskapurin frá tí eini flokkinum, ið sigur seg umboða "diplomatarnar" á fólkatingi !! Ja, skjótt er at gloyma !

Sambandsflokkurin hevur ikki rópt og geylað við brigsli um koloniharrar og "overdosis finansiel narkotika".

Í álitisfullum samstarvi við flokkin Venstre hevur Sambandsflokkurin arbeitt samvitskufult fyri føroyskum áhugamálum. Samstarvið hevur givið okkum møguleikan til fullgyldugar nevndarsessir, og ikki bert sum eygleiðarar. Í tingbólkinum hjá sama flokki hevur møguleiki verið at gjørt vart við frávík í støðutakan frá føroyskari síðu, og lættari at fáa ráðharrar í talu í ymiskum málum umframt innlit, tá mál hava verið til innanhýsis politiska viðgerð.

Tað hevur ongatíð í míni starvstíð verið ilt orð at hoyra, tá eg havi havt aðra støðu enn teir, og eg havi grundgivið hví.

Hesum møguleikum mugu vit ikki sleppa.

Samstundis sum eg vil nýta høvi at takka mínum trúføstu veljarum fyri teirra álit á meg hesa tíðina, heiti eg á allar veljarar um at standa saman um Sambandsflokkin og sambandshugsjónina.

Har eigur ongin at ivast.